


*Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, ásannar, at útlendingamálið í Føroyum er farið av sporinum*

# Landsstýrið eigur avgerðina

**– Hóast útlendingastýrið formliga eigur seinasta orðið, tá umsóknir koma úr Føroyum um familjusamanføring ella arbeiðs- og uppihaldsloyvi, fylgja nærum altíð tilmælinum frá føroyingum, segði Inge Bruhn Thomsen millum annað á fyrilestrinum, sum Innlendismáláráðið skipaði fyri fyrrapartin mánadagin um útlendingalógina**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Løgtinglimir. Landsstýrismenn. Embætisfólk. Aðalstjórar. Løgtingsins umboðsmaður. Fakfelagsformenn. Nógv fólk høvdu leitað sær á Parnassið á Hotel Hafnia fyrrapartin mánadagin at lurta eftir fyrilestrinum um óivað heitasta evnið í fjølmiðlunum í fjør, útlendingamálið. Innlendismálaráðið hevði boðið varastjóranum í í danska tlendingastýrinum, Inge Bruhn Thomsen, at greiða føroyingum frá um føroysku útlendingalógina.

### Fylgja tilmælunum

Fyrilesturin hjá varastjóranum í danska útlendingastýrinum var fyrst og fremst bygdur á lógirnar um familjusamanføring og arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Seinasta árið hava serliga fjølmiðlarnir varpað ljós á fleiri útlendskar familjur, sum hava livað í óvissu um tær fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvið longt ella ikki.

Ein av áhaldandi undanførslunum hjá Innlendismálaráðnum hevur verið, at útlendingamálið er danskt málsøkið, og tískil eigur danska útlendingastýrið seinasta orðið, tá umsóknir skulu viðgerast.

– Hóast útlendingastýrið formliga eigur seinasta orðið, tá umsóknir koma úr Føroyum um familjusamanføring ella arbeiðs- og uppihaldsloyvi, fylgja nærum altíð tilmælinum frá føroyingum, segði Inge Bruhn Thomsen millum annað á fyrilestrinum.

Varastjórin á Danska útlendingastýrinum vísti millum annað á, at arbeiðið hjá danska útlendingastýrinum var blivi meira umfatandi, eftir at VK-stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen hevur valt at herða lógirnar á útlendingaøkinum, tí tað er í dag ofta ein trupulleiki at gera av, hvørjar lógir galda á hvørjum øki.



*-Hóast útlendingastýrið formliga eigur seinasta orðið, tá umsóknir koma úr Føroyum um familjusamanføring ella arbeiðs- og uppihaldsloyvi, fylgja nærum altíð tilmælinum frá føroyingum, segði Inge Bruhn Thomsen millum annað á fyrilestrinum*

### Føroyar vantaðu

Í sínum stutta innleggi ásannaði landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, at útlendingamálið í Føroyum var farið nakað av sporinum, og hann setti sína vón til, at fundurin mánamorgunin kundi verða við til at fáa málið á rætta kós aftur. Men hetta eydnaðist ikki heilt.

Fyrilesturin hjá Inge Bruhn Thomsen var í stóran mun-kanska ov stóranbygd um donsk viðurskifti, meðan tað gekk striltið at varpa veruligt ljós á føroysku viðurskiftini. Hetta kom dátt við, tí viðurskiftini í Føroyum kunnu als samanberast við donsku viðurskiftini á útlendingaøkinum.